# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Oddaliðini draga frá

**SÍ liggur ovast á rókini, men har uppi eigur ÍF eisini innivist, tí tær hava ein dyst á láni. Um vikuskiftið er stóri spurningurin, um ungu kvinnurnar úr Kollafirði kunnu gera ÍF kvinnunum lívið súrt, tá hesar fara at dystast á Kambsdali**



*Um TB og KÍF megna at gera nakað við oddaliðini, tað fer bert tíðin at vísa*

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

ÍF hevur bert tap tein dyst í ár, og tað var móti SÍ herfyri, og í øllum hinum dystunum, hevur tað nærum verið avgreiðsluspurningar. Av teimum átta settunum, kvinnurnar úr Fuglafirði hava tapt, eru tey fimm tapt móti SÍ, og tað sigur ikki so lítið.

Á sama hátt sum hjá ÍF, er støðan í Sørvági tann at argastu kappingarneytarnar eru tær, ið hava stolið mest sett frá liðnum. ÍF hevur megnað at staðið seg best móti SÍ í ár, og tískil er ikki farið ov langt av leið, um kappingin væl at merkja fylgir verandi støðu, at gita sær, at ein møguligur vinnari verður at finna millum hesi bæði liðini.

### Hálvering av stigunum

Tá tveir triðingar av kappingini eru spældir, tá verða stigini hjá hvørjum einstøkum felagi hálveraði, og so verður byrjað aftur. Um hetta fer at broyta tað stóra í spurninginum um oddastríðið, tað fer bert tíðin at vísa. Hvussu er og ikki, skulu lið, sum KÍF og Dráttur, ið berjast um triðja plássið, rættuliga duga at kenna sína vitjunartíð, tá tey møta liðum, sum SÍ og ÍF.

### Strikaðir dystir

Herfyri varð greitt at Fram tók lið sítt úr Meistaradeildini hjá monnum, og aftaná hetta hava nakrir av leikarunum á Framliðnum valt at fara at spæla við Fleyr. Fram tapti seks dystir og vann ein, áðrenn teir valdu at taka liðið úr kappingini, og tískil eru allir dystir, Fram hevur spælt, og átti at havt spælt framyvir, slettaðir og telja hesi úrslit tískil heldur ikki við á stigatalvuni.

### Kampur um plássini

Hjá monnunum er bert talan um ein dyst um vikuskiftið, og tað er at kalla ein lagnudystur hjá ÍF og Mjølni. Hesi bæði lið royna at elta oddaliðið SÍ, og liggja tey ájøvn við seks stigum. Oddaliðið SÍ hevur fýra fleiri, men tó spælt ein dyst meira eisini. So man kann siga at tað er ein sera spennandi dystur, ið spælast skal á Kambsdali um vikuskiftið. Vinnarin av hesum dystinum verður tá bert tvey stig aftanfyri oddaliðið, meðan taparin drálar í FM-stríðnum.

## Dystir í vikuskiftinum

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 15.12 | 14:00 | ÍF-KÍF |
| 15.12 | 15:00 | TB-SÍ |

**Meistaradeild menn**

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 15.12 | 16:00 | ÍF-Mjølnir |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 15.12 | 14:30 | StÍF-Kyndil |
| 15.12 | 14:30 | VÍF-Neistin |

**Atlantic Airways-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 15.12 | 16:00 | StÍF-Kyndil |
| 15.12 | 16:00 | H71-KÍF |
| 15.12 | 16:00 | VÍF-Neistin |

# StÍF og Neistin draga frá

**Stóri spurningurin hetta vikuskiftið, er hvørt Neistin megnar at halda pressið á hinum oddaliðnum, við at vinna í Vestmanna. Og so verður eisini spennandi at síggja um Kollfirðingar kunnu gera Hoyvíkingum nakað á útivølli**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Seinast, Neistin var á vitjan í Vestmanna, var afturi í november, og tað ferðina endaði við sera málríkum javnleiki millum liðini. Heili 36-36 stóð á máltalvuni, tá síðsta bríksl ljóðaði. Um tað vera eins nógv mál hesa ferð, er ilt at meta um, men tað verður spennandi at fylgja við, hvussu leikur ferst.

Hjá VÍF verður vónað, at liðið finnur eitt vet av spælinum, teir sýndu í Havn herfyri, móti hinum havnarliðnum, Kyndli. Tað ferðina vunnu teir 31-26.

Eisini verður spennandi at síggja hvussu blíður Ingi Olsen fer at vera móti sínum bygdamonnum og gomlu liðfeløgum.

### H71 kunnu nærkast

Skuldi tað gingist Neistanum ella StÍF illa í vikuskiftinum, hava hesi bæði eitt mótstøðulið, ið liggur og lúrir eftir møguleikanum, skamt aftanfyri. Liðið, talan er um er sjálvsagt H71, ið eru fimm stig aftanfyri oddin í løtuni. Men skjótt vendist í hondbólti, so tað er ikki til at siga, hvussu leikur ferst. Eitt er tó púra vist, og tað er at H71 fer at leggja alt fyri, til tess at vinna, tá Kollfirðingar koma á vitjan.

Hjá KÍF verður vónað at teir báðir útlendsku leikararnar fara at gera meira um seg, og at teir megna at steðga hartskjótandi hoyvíkingunum.

Seinast, hesi bæði liðini hittust var afturi í november, og tá endaði við sigri til hoyvíkingar, hóast munurin bert var tvey mál, 24-22. Hvussu fer at ganga hesa ferð, fer bert tíðin at vísa.

### Kann nakar steðga StÍF?

StÍF hevur seinastu tíðina rættuliga víst, hvat krevst, fyri at liggja í oddinum. Teir hava ein framúr málmann, serstakliga góða verju, góð skjótálop og góðir skjúttar, ið kunnu skjóta nærum allastaðni frá, harumframt hava teir ein spældeilara, ið megnar at avlevera til røttu tíð, í flest øllum støðum.

Nú ljóðar tað kanska av so øðiliga nógvum, men Kyndil skal veruliga standa gott, skulu teir fara av Skála aftur, við stigi í skjáttuni. Teir mugu onkursvegna fáa opnað verjuna hjá Strandingunum og samstundis fáa brotið teirra spæl nóg skjótt. Eitt er greitt, at sleppur StÍF at spæla sítt spæl, ótarnað, so eru ikki nógv lið, ið megna at standa ímóti.

Kyndlaliðið hevur verið trilvandi í ár, við svingandi úrslitum, men teir ynskja at vera við í stríðnum um heiðursmerkir, og skuldu teir vunnið á Skála, standa teir í góðari støðu í stríðnum um triðja pláss.